

> Tað ábyrgdarleysa er at trútta niður í fólk, at vit ikki klára okkum, um vit ikki fáa meiri pengar úr Danmark, tá man sjálvur hevur ført landið í kreppu (...) Allir flokkar siga seg ganga inn fyri einum sjálvberandi búskapi, men um vit ikki fastfrystu blokkin, so hevði hann verið 1,4 milliardir í dag. Hevði tað verið ein sjálvberandi búskapur?

MYNDIR: JÓANNES S. HANSEN

*– Taka vit skattalættan pluss tað, sum Hans Pauli Strøm hevur yvirtrekt ólógliga, so hava vit hallið í dag, sigur Høgni Hoydal.*

**Edmund**: Nei nei, vit rinda einki aftur av blokkinum, heldur ikki rentur. Hetta eru reinar undanførslur hjá Høgna. Blokkurin eru pengar sum allir aðrir avlopspengar. Støddin á blokkinum eru skyldur, sum enn liggja í Danmark, tí málsøkir ikki eru yvirtikin, sum tilsamans kosta 615,5 milliónir. Hesir pengar eru hvørki verri ella betri enn allir aðrir pengar, og eg skilji ikki, hví blokkurin er vorðin rótin til alt ilt. Vit hava alla tíðina sagt, at blokkniðurskurðurin kemur okkum aftur um brekku, og nú skulu vit rinda prísin.

**Edmund, tú vilt tiðna blokkin aftur, so upphæddin á 615 milliónir fylgir prísvøkstrinum. Samstundis hevur tú verið við til at geva skattalættar, sum hava kostað landskassanum hundraðtals milliónir. Hví skal føroysk vælferð fíggjast við donskum pengum, tá vit hava ráð til ein skattalætta fyri meðal- og yvirstættina í Føroyum?**

**Edmund**: Blokkurin eigur at vera ein prístalsviðgjørd upphædd fyri málsøkir, sum danir enn umsita í Føroyum. Blokkniðurskurðurin á 366 milliónir var ein skipað yvirtøka, sum ikki kann broytast, men fastfrystingin var eitt politisk inntriv, sum saktans kann broytast, tí danir eiga at gjalda meiri, enn teir gera nú. So spyrt tú um skattalættan. Vit hava eitt av heimsins hægstu skattatrýstum, og vit eru í vinnuligari kapping við londini kring okkum, sum øll hava eitt lægri skattatrýst. Tí lækkaðu vit skattin í 2004. Men eg viðurkenni, at seinastu tvey árini av valskeiðinum frá 2004 til 2008 skuldu vit havt strikað skattalættan.

**Ert tú so samdur við teimum, sum kritiseraðu skattalættan fyri at hita ein búskap, sum frammanundan var nóg heitur, m.a. Búskaparráðið?**

**Edmund**: Ja. Altso, tað var rætt at føra ein ekspansivan búskaparpolitikk í 2004, men vit skuldu havt steðgað í 2006. Tað var eitt mistak at veita skattalættar tvey tey seinastu árini av valskeiðinum.

**Høgni**: Umframt at skapa sosiala ójavnvág, so sprændi skattalættin pengar inn í ein glóðheitan búskap. Vit tóku pengar úr renslinum við at skerja blokkin, men ABC-flokkarnir hava pumpað 400 milliónir innaftur við skattalættum. Kostnaðarstøðið reyk upp. Útlendska arbeiðsmegin steðgaði. Og tað er eingin disiplin í fíggjarstýringini mótvegis tíðini, tá Edmund var løgmaður í nítiárunum. Taka vit skattalættan pluss tað, sum Hans Pauli Strøm hevur yvirtrekt ólógliga, so hava vit hallið í dag. At skylda uppá blokkniðurskurðin er tað reina slendrian. Og so vil eg spyrja Edmund ein spurning: Um danskir pengar eru so fantastiskir, hví fer man so ikki til Danmarkar at biðja um eina, tvær, tríggjar ella fýra milliardir? Hvat forðar tykkum í tí?

**Edmund**: Tað er tað reina møsn at spyrja soleiðis. Blokkurin er ein skipan, har danir rinda fyri nakrar uppgávur í Føroyum, sum enn ikki eru yvirtiknar. Um hendan upphæddin varð prístalsviðgjørd, so høvdu vit fingið 125 milliónir afturat, sum vit hava rætt til. Samfelagið fór á húsagang við fullum blokki, og vit komu á føtur aftur við fullum blokki. Vit kláraðu at halda eina konstanta fíggjarlóg frá 1994 til 1998 og skaptu eitt yvirskot á 500 milliónir, so Høgni og kompaní kundu halda fram. Høgni, er tað partú neyðugt at vera fátækur fyri at føra ein ábyrgdarfullan búskaparpolitikk?

*Sama arbeiðspláss, men tvær politiskar visjónir. Høgni Hoydal (vinstrumegin) og Edmund Joensen við stóru trappuna í fólkatinginum.*

